## Gullparið heldur fram

Sigfríður Clementsen og Magni Mohr standa eisini á odda fyri EB/Streymi, tá kappingarárið 2009 byrjar. Hetta kundi Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi, boða frá fríggjamorgunin. Hann vitjaði á Rás2, sum sendi Gullradio frá Inn við Norðskála í dag, og har kundi hann avdúka, at gullparið, Sigfríður Clementsen og Magni Mohr, eisini stendur við róðrið komandi kappingarár.



## Redknapp er til reiðar

Nýggjur venjari í enska felagnum er Harry Redknapp, eftir at spaniólin Juande Ramos um vikuskiftið fekk sekkin. Harry Redknapp hevur vant Portsmouth við góðum úrslitum, og Tottenham hevur verið noytt at gjalda Portsmouth 50 milliónir krónur fyri at Redknapp leysan. - Hetta er ein fantastiskur møguleiki at venja eitt stórfelag, áðrenn eg gevist sum venjari, sigur Redknapp við Skysports.

# Jon Hestoy er svimjiformaður

**Talið av starvsnevndarlimum er hækkað, og saman við Jon Hestoy eru Andrea Eldevig og Palli Eysturberg nývald**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*



*Jon Hestoy tekur nú við sum formaður í svimjisambandinum. Her er hann saman við Palla Ziskason, sum legði frá sær leygardagin*

Ársaðalfundur varð hildin í Svimjisambandinum leygardagin 25. oktober. Á skránni vóru lógarbroytingar, og avgjørdi aðalfundurin, at frameftir verður ársaðalfundurin hildin í mai í staðin fyri oktober, í hesum sambandi er roknskaparárið broytt til kalendaraárið. Talið av starvsnevndarlimum er hækkað frá trimum til fimm.

Formaðurin seinastu fýra árini, Palli Ziskason, hevði boðað frá at hann ikki tók við afturvali, í hansara stað var Jon Hestoy valdur. Tveir nýggjur limir vóru valdir, Andrea Eldevig og Palli Eysturberg. Um hesi trý eru Jórun Eið og Maud Poulsen í starvsnevndini.

Øll sjey svimjifeløgini vóru umboðaði á fundin og lívligt orðaskifti var um svimjiviðurskifti.

NSÍ-Skála 2-0 (0-0):

# Skála blást yvir um fjørðin

*NSÍ*

*Skála*

**Vindurin stóð fyri mest eyðsýnda avrikinum við Løkin, har Skála segði farvæl við bestu deildina og ivaleyst fleiri av sínum spælarum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var við Løkin, at Skála eitt mánakvøld í góðum líkindum fyri trimum árum síðani ikki hevði dómaratekki og harvið misti FM heitið.

Í gjár var Skála enn eina ferð við Løkin, og nú var alt heilt øðrvísi. Heystarveðrið var so vánaligt, sum tað næstan kann vera, og støðan hjá Skála var tann, at liðið longu var á veg niður í næstbestu deildina, áðrenn dómarin hættaði sær at bríksla fyri fyrstu ferð.

NSÍ vann 2-0, og annars er ikki so nógv at siga um tað. Einar Hansen, sum – eitt nú orsaka av skaða - ikki hevur havt sama leikliga undanvind!, sum hann hevði tað í fjør, tá ið hann vann sær fast pláss á landsliðnum, skoraði til 1-0 við rimmar langskoti undan vindinum, og Bogi Løkin staðfesti heimasigurin við frísparki úr næstan 40 metrum og undan vindinum.

Skála royndi í 1. hálvleiki at fáa nyttu burturúr nógva undanvindinum. Málkarmurin aftanfyri Tórð Thomsen stóð sína roynd, og í 2. hálvleiki var heimaliðið omaná, um tað ber til at siga tað soleiðis.

Merkisvert var tað, at Jónhard Frederiksberg ikki var í Skála álopinum. Tá ið hann í summar flutti úr Runavík og yvir aftur á Skála, var tað ein partur av avtaluni, at Jónhard bara skuldi spæla annan av dystunum ímóti NSÍ.

Merkisvert var tað eisini, at toppskjúttin hjá NSÍ, unglingaspælarin Øssur Dalbúð, var settur á beinkin, og at Aco Pandurovic, sum ikki sleppur at halda fram í Runavík, var í álopinum.

Tá ið dómarin hevði bríkslað fyri síðstu ferð, vóru spælararnir ísafrystir.

Tað er mest sum greitt, hvørjir spælarar fara at manna NSÍ liðið, sum næsta ár ætlar sær at vera við í toppstríðnum. Meiri ivi er um, hvørjir teir fara at vera, sum fáa setningin at spæla Skála upp aftur í bestu deildina.


